Broytingar hjá BUSSLEIÐINI á ólavsøku 2000

Í sambandi við ymisk tiltøk á ólavsøku 2000, eru hesar broytingar hjá Bussleiðini:

27.07.2000:
Leið 1 koyrir seinasta túr kl. 17^{53}
Leið 2 og 3 koyra eftir Jónas Broncks gøtu eftir kl. 18^{00}

28.07.2000:
Leið 1, 2 og 3 koyra eftir Jónas Broncks gøtu.
Leið 1 koyrir oman eftir Dalavegnum ístaðin fyri Varðagøtu/Tróndargøtu.
Leið 1 koyrir ikki ímillum kl. 13^{23} og 17^{53}
Leið 2 koyrir ikki ímillum kl. 13^{08} og 18^{08}
Leið 3 koyrir ikki ímillum kl. 13^{09} og 18^{09}

29.07.2000:
Leið 1, 2 og 3 koyra eftir Jónas Broncks gøtu.
Leið 1 koyrir oman eftir Dalavegnum ístaðin fyri Varðagøtu/Tróndargøtu.
Leið 1 byrjar at koyra kl. 12^{23}
Leið 2 byrjar at koyra kl. 12^{08}
Leið 3 byrjar at koyra kl. 12^{09}

Tórshavn, 21.07.2000

Bussleiðin og Tekniska deild

Tórshavnar kommuna



Kinesiska matstovan Nantong

Ólavsøkumatarskrá

Vel ímillum tvær samansettar skráir

A
Várrulla
Oksakjøt og grønmeti í karrysós
kr. 135,-

B
Innbakaðar rækjur
Toskur í søtari shilisós
Lambslundir og grønmeti í ostrasós
kr. 155,-

Upplatingartíðir:
28/7 17.00-02.00
29/7 15.00-02.00
30/7 15.00-24.00

Nantong
Tinghúsvegur 8 - 3. hædd
Postrúm 121, 110 Tórshavn
Tel. 31 86 98 / 32 03 83

Sosialurin - 311820

Felagsskúlin á Oyrarbakka

Søkt verður eftir vikari fyri lærara, sum vegna ársskeið hevur farloyvi frá 16.10.2000 til 12.10.2001.

Lærugreinir: Støddfrøði, alis-/evnafrøði, enskt og søga/samtíð í framhaldsdeildini.

Umsøkjarar kunnu velja millum hesar tíðaravmarkingar:
Tíðarskeiðið 16.10.2000 til 12.10.2001.
Tíðarskeiðið 16.10.2000 til 30.06.2001.

Starvið, sum er tíðaravmarkað, verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera Felagsskúlanum á Oyrarbakka í hendi í seinasta lagi 12. august 2000.

Felagsskúlin á Oyrarbakka
450 Oyrarbakki

Kunngerð um ferðslu á Ólavsøku 2000

Ólavsøkuaftan og Ólavsøkudag 28. og 29. juli frá kl. 14.00 til næsta morgun kl. 08.00 verða hesar broytingar í ferðsluni:

Bilferðsla er **ikki** loyvd, eftir **Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í N. Finsensgøtu frá Vaglinum og niðan til AUTO ella í Mylnugøtu**. Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er **ikki** loyvd tvørtur um **Niels Finsensgøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún**, undantikin eru hýruvognar og Buss- og Bygdaleiðir. Um hetta vegamót gongur støðugt nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi.

Í Niels Winthersgøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku er loyvt hýruvognum at søkja hýru.

Meðan kappróðurin fer fram Ólavsøkuaftan, er **Eystara Bryggja stongd frá Kongabrúnni til Jónas Broncksgøtu** fyri vanligari bilferðslu frá kl. 15.00 til kl. 19.00.

Á parkeringsøkinum á Bursatanga er ikki loyvt at parkera frá 27. juli kl. 20.00 til 29. juli kl. 09.00.

Ólavsøkudag, millum kl. 10.00 og kl. 14.00, verður øll ferðsla um **Vaglið** órógvað og roknast kann við, at ikki er gjørligt hesa tíðina at koyra eftir Mylnugøtu, Áarvegnum um Vaglið v.m. vegna skrúðgongu úr Føroya Løgtingi í Dómkirkjuna og aftur.

Tórshavn, hin 24. juli 2000
Petur Poulsen
vicepolitikommisserur

www.wenzel.fo

Ford

GK-EL
v/ Georg Kjærbo
løggildum el-innleggjara
byrjar 25. juli

Tænastur innan el-arbeiði og teldunet

GK-EL
v/ Georg Kjærbo
á Sevmýru · 800 Tvøroyri
Tlf. 210608

Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár... Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Stranda Skúli

Søkt verður eftir 1 vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi skúlaárið 2000/2001.

Starvið er 18 tímar um vikuna.

Starvið, sum er tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2000/2001, verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálstýrið.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 09. august 2000.

Sjóvar skúlanevnd
Mass Djurhuus
494 Innan Glyvur

Til sølu

Ein Hyundai Sonata í góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst. Árg. 10/96.

Tlf. 320680 ella 214120

Summarfrí

Vit hava stongt frá 24. juli til 13. august.

Tannlæknastovan
hjá Unnur Jensen
Varðagøta 26
100 Tórshavn

www.sosialurin.fo

Politistafelagi› gevur út bók

Í sambandi vi› at politistafelagi› hevur 50 ára stovningardag ólavsøkudag, gevur felagi› út bók, sum kallast »Politi í Føroyum fyrr og nú«

STEFAN Í SKORINI

Hjartvard Eivind Skálagar› hevur skriva› bókina, sum er 550 sí›ur, og hon hevur eini 300 myndir. Ta› er Føroya Politistafelag, sum gevur út í samstarvi vi› Bókadeild Føroya Lærarafelags, og ta› er Hestprent, i› stendur fyri umbróting og prentingini.

Hjápt Hjartvardi í arbei›num hevur Róland Waag Høgnesen, og Svenning Tausen hevur rættlisi›. Nils Jákup Thomsen hevur sta›i› fyri arbei›num á Bókadeildini.

Bókin sn‡r seg ikki bara um tí›arskei›i› eftir 1950, tá i› felagi› var› stovna›. Eisini ber til at lesa um s‡slumanssøguna frá landnámstí› til dagin í dag og politisøguna í 100 ár. Uppl‡singar um allar politistar í Føroyum frá 1903 til dagin í dag eru eisini at finna í bókini.

Høvu›spersónurin í bókini er Sámal av Krákusteini, sum í 1902 gjørdist 1. politistur í Havn, eftir at politistali›i› á Skansanum frá 1865 var› syndra›. Sámal doy›i í 1932. Á tí›indafundinum, tá i› bókin var› avdúka›, vóru tveir abbasynir hjá Sámali á Krákusteini hjástaddir. Teir vóru Sámal og Hassi Kraagesteen, og teir fingu hvør sítt eintak av bókini.

Hjartvard E. Skálagar› hevur skriva› bókina
Mynd: Jens Kr. Vang

Sámal og Hassi Kragesteen fáa hvør sítt eintak av bókini »Politi í Føroyum fyrr og nú« frá Hjartvardi E. Skálagar›
Mynd: Jens Kr. Vang

Langtí›arætlan

Tá i› Føroya Politistafelag fyri tíggju árum sí›ani hev›i 40 ára stovningardag, var› gjørt av at geva út bók um politii› í Føroyum, tá i› felagi› gjørdist 50 ár. Nú er dagurin so upprunnin, og bókin liggur klár í bókabú›unum. Hon kostar 295 krónur.

United Voices konsert á ólavsøku

Eitt av mongu tiltøkunum á ólavsøku ver›ur ein konsert vi› gospelkórinum United Voices

HEINI Í SKORINI

United Voices er eitt kór, sum í løtuni er í stórari menning, og ta› gerst alsamt betri og betri umtókt í okkara landi. Frá tí at kóri› fyrstu fer› var á palli í 1997 og til tann dag í dag, eru ymiskar broytingar farnar fram, vi› ta› at manningin er skift eitt sindur út, hóast ta› enn eru fleiri, i› hava veri› vi› líka frá byrjan. United Voices hevur havt konsertir kring landi› vi› jøvnum millumbilum, og líka frá byrjan av hava altí› nógv fólk veri› til teirra framførslur.

Nú ver›ur so enn ein møguleiki hjá føroya fólki at hoyra United Voices, tí kóri› fer nevniliga at hava eina konsert í kommunuskúlagar›inum á ólavsøku. Konsertin ver›ur 28 juli frá 21.30 til klokkan 23.00. Konsertin er ókeypis, og ta› er Tórshavnar Ítróttará› i› skipar fyri.

Hava veri› uttanlanda

United Voices hevur júst veri› uttanlanda og havt konsertir, kóri› var bæ›i í Danmark og Álandi frá 26. juni til 4. juli, og ein teirra sum hevur veri› vi› líka frá byrjan, Linda Petersen, sigur, at fer›in og konsertirnar eydna›ust bara heilt væl. So vit kunnu vænta eitt hoyra eitt kór í gó›ari venjing 28. juli ni›ri í kommunuskúlagar›inum. United Voices hevur havt tríggjar uttanlandakonsertir, og Linda Petersen sigur, at ta› ver›ur sama framførsla á ólavsøku sum í Danmark og Álandi, og tess vegna er ikki ney›ugt vi› so nógvari venjing upp undir konsertina, av tí at tey hava framført júst hetta so ofta. Men Linda sigur samstundis, at tey eru sera spent uppá hesa konsert, av tí at tey ongantí› fyrr hava framført á ólavsøku. United Voices fer á ólavsøku eisini at royna n‡ggjar lei›ir, vi› ta› at tey hava fingi› ein gestasolist at framføra saman vi› teimum, og er ta› klaksvíkingurin Torkil Mørkøre sum skal framføra tvey løg saman vi› kórinum. United Voices fer eisini at royna seg vi› ø›rum bassspælara, vi› ta› at tann sum vanliga spælir bass er uttanlanda í løtuni. So ta› ver›ur eitt United Voices vi› ymiskum broytingum, sum ver›ur at hoyra á ólavsøku.

Tilsamans eru umlei› 35 fólk vi› í kórinum, og kórlei›ari er Eirikur Skála, sum eisini var vi› til at byrja hetta kóri› í 1997.

Syngja fyri Jesus

Sum sagt er United Voices eitt tvørkirkjuligt gospelkór, i› syngur og spælir andaligan tónleik, og sangararnir og tónleikararnir eru frá ymiskum kirkjum og samkomum kring landi›. Tá eg so at enda spyrji Lindu, um tey hava naka› ávíst endamál vi› konsertini, er hon skjót at svara:

– Vit syngja heilt víst fyri Jesus!

Vit vóna, at vit koma at uppliva eina gó›a konsert ni›ri í kommunuskúlagar›inum 28. juli klokkan 21.30, og so er bert at vóna, at ve›ri› ver›ur til vildar, og at nógv fólk fer at leita sær oman í kommunuskúlagar›in.

Skálafjar›alei›in gongur væl

Sí›ani 10. juli hevur Ternan 1 siglt millum Skálafjør›in og Havnina, og er ta› fyrstu fer› í longri tí›. Skiparin sigur, at higartil hava nógv fer›afólk gjørt sær dælt av siglingini

HEINI Í SKORINI

Sí›ani 10. juli er Ternan 1 aftur byrja vi› Skálafjar›asiglingini, og er ta› fyrstu fer› í longri tí›, at fólk hava møguleika at sigla av Skálafjør›inum til Havnar. Løgtingi› samtykti, at ein ferja aftur skuldi til at sigla av Skálafjør›inum, og nú er so aftur møguleiki hjá fólki at fer›ast úr Eysturoynni og til Havnar. Ternan 1 siglir tríggjar túrar um dagin, og lei›in gongur frá Strondum til Toftir og sí›ani til Havnar og tekur ta› umlei› 50 minuttir. Skiparin umbor› sigur, at higartil hevur eydnast heilt væl.

– Ta› hevur veri› heilt hampuligt av fer›afólki higartil, og so vítt eg veit, er ætlanin at halda fram vi› hesi sigling, ljó›ar frá honum. Hann sigur, at ta› sjálvandi ikki er hansara avger›, hvussu ver›ur vi› hesi sigling í framtí›ini, ta› er upp til politikararnar, men higartil hevur gingi› heilt væl. Spurdur, um ta› loysir seg fíggjarliga at sigla um Skálafjør›in, sigur hann, at ta› veit hann ikki, tí ta› hevur hann sum so einki vi› at gera, men eitt er heilt víst, og ta› er, at hetta er ein fyrimunur fyri Føroya fólk, og serliga tey sum búgva inni í Eysturoynni. Prait hevur siglt um hesa lei›ina fyrr, men nú hevur Ternan 1 sum sagt tiki› yvir, og er ta› eisini eitt størri og rúmligari skip enn Prait.